# LØGTINGIÐ

## TINGHÚSVEGUR 1 - 3

## GRANNSKOÐANARFRÁGREIÐING

## 2010

**FRUMRIT**

**Inngangur**
Vit hava grannskoðað tær kontur, sum eru á §1 í Landsroknskapinum fyri 2010 – roknskap løgtingsins, umsiting tess og stovnar, knýtir at løgtingsinum.

*Frágreiðing okkara hevur verið send leiðsluni á umsiting tingsins, Súsonnu Danielsen, leiðsluni á Landsgrannskoðanini, Beintu Dam og Løgtingsins umboðsmanni, Sólju í Ólavsstovu, til ummælis. Teirra viðmerkingar eru tilskilaðar í frágreiðingini.*

**Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans**
Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin fyri 2010. Vit hava grannskoðað samsvarandi galdandi føroyskum grannskoðanarreglum, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa grundaða vissu fyri, at tað ikki eru týðandi skeivleikar í roknskapinum.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, sum skal til fyri at fáa grannskoðanarprógv fyri upphæddum og upplýsingum í roknskapinum. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um vandan fyri týðandi skeivleikum í roknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið skal til fyri at leiðslan kann gera ein roknskap, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki fyri at gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin ber eisini í sær, at støða verður tikin til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, um tær roknskaparligu metingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar, og hvussu roknskapurin sum heild er gjørdur.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kann vera grundarlag undir okkara niðurstøðu.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Tað er okkara fatan, at roknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av úrslitinum av virksemi Løgtingsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2010.

## Grannskoðanin

**Alment**
Vit hava við stakroyndum eftirkannað sannanina viðvíkjandi upphæddum og upplýsingum í rakstrarroknskapinum. Vit hava gjøgnumgingið og mett um mannagongdir og innaneftirlit, ið hava týdning fyri hvussu rakstrarroknskapurin er uppsettur. Harumframt hava vit við stakroyndum kannað skjalatilfarið og tilhoyrandi bókingar. Vit hava við stakroyndum kannað kostnaðarskjøl, til tess at staðfesta, um rætti persónur hevur ávíst og váttað skjølini, um rætt er bókað og at skjølini annars hoyra stovninum til. Gjøgnumgongd okkara hevur ikki ført til nakrar viðmerkingar.

Undir grannskoðanini verða upphæddirnar í rakstrarroknskapinum kannaðar, samanhildnar við undanfarin ár og við givnum játtanum.

Vit hava somuleiðis gjøgnumgingið fundarfrágreiðingar hjá formanskapinum fram til 18. november 2011. Vit hava ongar viðmerkingar í hesum sambandi.

**Játtan**
Tann samlaða jattanin til Løgtingið er uppá 44,0 mió.kr. og er sundurgreinað soleiðis niður á øki (mió.kr.):

| Stovnur: | 2010 | 2009 | Øking í % |
|---|---|---|---|
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | 4,4 | 4,5 | -2,2 |
| Løgtingsarbeiði | 30,4 | 29,8 | 2,0 |
| Nýggjur bygningur | 0,0 | 0,3 | -100,0 |
| Landsgrannskoðanin | 6,0 | 6,0 | 0,0 |
| Løgtingsins umboðsmaður | 3,2 | 3,2 | 0,0 |
| **Tilsamans** | **44,0** | **43,8** | **0,5** |

Játtanin til løgtingsarbeiði er sundurgreinað soleiðis (mió.kr.):

| Stovnur: | 2010 | 2009 | Øking í % |
|---|---|---|---|
| Løgtingsmenn | 19,1 | 18,6 | 2,7 |
| Fyrisiting løgtingsins | 9,3 | 9,3 | 0,0 |
| Stuðul til parlamentariskt arbeiði | 1,8 | 1,7 | 5,9 |
| Eftirlitisuppgávur | 0,2 | 0,2 | 0 |
| **Tilsamans** | **30,4** | **29,8** | **2,0** |

Sum tað framgongur omanfyri, so er tann størsta einstaka lækkingin í játtanini til nýggja bygningin – ein lækking í játtanini uppá 100%. Játtanin er farin úr 250 t.kr. niður á kr. 0 samanborið við 2009. Eisini er játtanin til eftirløn og bíðiløn lækkað við 2,2%. Landsgrannskoðanin og løgtingsins umboðsmaður hava fingið nærum somu játtan sum í 2009. Játtanin til løgtingsarbeiðið er tilsamans økt við 2,0 % samanborið við 2009.

Tann samlaða hækkingin er uppá 0,5% samanborið við 2009 – hetta er ein hækking uppá 0,2 mió.kr.

## Lønir v.m.
Lønir v.m. eru nógv tann størsti kostnaðarposturin hjá løgtinginum við tilhoyrandi stovnum. Tískil hevur grannskoðanin lagt serligan dent á at kanna lønarútgjaldingarnar v.m. fyri 2010. Kanningar okkara hava tikið støði í galdandi lóggávu, sáttmálum o.s.fr.

*Tingmenn*
Viðv. tingmonnum hava vit undir grannskoðanini kannað um samsýningar, kostnaðarendurgjøld og ferða- og dagpeningur uttanlands til løgtingsmenn er goldið í tráð við løgtingslóg nr. 12. frá 18. februar 1999 um samsýning og eftirløn løgtingsmanna. Eftirlønir og bíðilønir eru somuleiðis kannaðar. Samanhildið er við galdandi sáttmálar.

Tingmenn verða samsýntir samsvarandi 34. lønarflokki í tænastumannalógini, íroknað vanliga viðbót. Afturat hesum verður veitt árligt kostnaðarendurgjald, svarandi til flutningskostnað 100 ferðir aftur og fram árliga, koyripeningur millum heimstað og Tórshavn 100 ferðir aftur og fram árliga, tímapening fyri 10 tímar dagliga í 100 dagar, tó fyri Suðuroyar tingmenn fullur dagpeningur í 100 dagar. Tingmenn í Tórshavn, Hoyvík, á Argjum og Hvítanesi fáa ikki kostnaðarendurgjald. Harumframt verður veitt kostnaðarískoyti uppá kr. 2.000 um mánaðin.

Næstformonnum Tingsins og nevndarformonnum verður veitt ein samsýning, ið er kr. 30.000 árliga, tó so um tingmaður røkir meira enn eina av hesum uppgávum, so verður bert ein samsýning veitt.

Kostnaðarendurgjaldið verður lækkað við 1/100 av kostnaðarendurgjaldinum, fyri hvønn tingdag, tingmaður ikki møtir á løgtingsfundi. Umsiting tingsins ger frádráttin upp á hvørjum ári í juni mánað. Vit hava staðfest, at tær reguleringar, ið eru framdar samsvara við undirliggjandi skjøl viðvíkjandi fráveru.

Grannskoðan okkara hevur eisini umfatað ferðaforskot og ferðauppgerðir hjá tingmonnum. Veitt verður ferðaendurgjald og dag- og tímapeningur eftir reglunum, sum eru galdandi fyri tænastumenn landsins. Reglurnar eru ásettar í rundskrivi frá fíggjarmálaráðnum dagfest 1. januar 2009 um tænastuferðir uttanlands v.m. Upphæddirnar eru ásettar í vegleiðing til ferðauppgerð fyri tænastuferðir uttanlands.

Ongar viðmerkingar eru annars í hesum sambandi.

**Umsiting tingsins, Landsgrannskoðanin og Løgtingsins umboðsmaður**

Vit hava eisini fyri Umsiting tingsins, Landsgrannskoðanina og Løgtingsins umboðsmann kannað, um útgoldnar lønir v.m. eru samsvarandi galdandi lønarsáttmálum við avvarðandi feløg, eins og skjalprógv fyri umflokkingum, setanarskrivum v.m. eru kannað.

Fleiri viðmerkingar eru ikki í hesum sambandi.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

Stuðulin verður goldin, sambært Floksskrivarareglugerð frá 25. januar 2000, við tilhoyrandi broytingum 1. mars 2000 og 13. mars og 19. november 2008. Hvør flokkur fær grundgjald uppá 65 t.kr. Harumframt hevur hvør flokkur rætt til 35 t.kr. árliga fyri hvønn tingmann meira enn ein.

Sambært §7 í reglugerðini skal grannskoðari løgtingsins eisini grannskoða henda roknskapin.

Umsiting tingsins umsitur stuðulin, men hvør flokkur skal tilnevna ábyrgdarpersón, sum hevur ábyrgdina av, at stuðulin verður umsitin, sambært reglunum.

Vit hava skjalagrannskoðað kostnaðirnar viðv. stuðli til parlamentariska arbeiðið. Umsiting tingsins hevur góðkent og ávíst skjølini, sum ábyrgdarpersónur fyri viðkomandi tingbólk, hevur váttað.

Sambært reglugerðini, skal í minsta lagi helvtin av stuðlinum nýtast til skrivara/r, t.v.s umframt løn, eisini frítíðarløn, arbeiðsmarknaðargjøld v.m.

Niðanfyri standandi talva lýsir, í hvønn mun síðstnevnda treyt er lokin:

| T.kr./flokkur | A | B | C | D | E | H | 2011 | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Umboð á tingi | 7 | 7 | 6 | 2 | 8 | 3 | 0 | 33 |
| Grundupphædd §1 | 88 | 88 | 88 | 88 | 88 | 88 | 0 | 530 |
| Tingmannaupphædd §2 | 275 | 275 | 229 | 46 | 321 | 92 | 0 | 1.237 |
| Stuðul tilsamans | 363 | 363 | 317 | 134 | 409 | 180 | 0 | 1.767 |
| Nýtsla 2010 | 310 | 364 | 318 | 133 | 401 | 113 | 11 | 1.650 |
| Meir/Minninýtsla | -53 | 1 | 0 | -1 | -8 | -66 | 11 | -117 |
| Lønir | 202 | 448 | 295 | 121 | 334 | 111 | 11 | 1.521 |
| Helvtin av stuðli til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| - munur | 21 | 267 | 136 | 54 | 129 | 21 | 0 | 638 |
| Helvtin av kostn. til lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |
| - munur | 47 | 266 | 136 | 54 | 133 | 54 | 0 | 696 |
| Max. helvtin av stuðli til annað enn lønir | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja | Ja |

Sum tað framgongur av talvuni omanfyri, so er talan um eina minninýtslu samanlagt uppá 117 t.kr. Tó hevur sambandsflokkurin nýtt 1 t.kr. meira enn játtað. 11 t.kr. eru bókaðar til parlamentariskt arbeiði, sum hoyrur til roknskaparárið 2011.

Grannskoðanin fer at vísa á, at sanktiónsmøguleikar ikki eru til staðar fyri flokkar, sum ikki halda latnu játtanina, ella fyri flokkar, sum nýta játtanina til onnur endamál, enn tað, sum ætlanin er. Heitt verður á formansskapin um at umhugsa sanktiónsmøguleikar hesum viðvíkjandi.

Í reglugerðini um stuðul til flokkarnar á tingi og um løn til floksskrivarar §5, stk. 3 er ásett, at um tingbólkurin í einum fíggjarári hevur brúkt meira enn tillutaða stuðulin, verður meirnýtslan drigin frá í stuðlinum fyri næsta ár.

Víst verður á, at sambandsflokkurin hevur nýtt 448 t.kr. til lønir. Sambandsflokkurin hevur endurgoldið 88 t.kr. og samlaða nýtslan hjá flokkinum í 2010 er tí 364 t.kr., sum víst á talvuni frammanfyri.

Spurningurin um ásetingin, at minst helvtin av stuðlinum skal verða nýttur til lønir, er nóg greitt orðað. Men sambært Umsiting tingsins hevur formansskapurin tulkað ásetingina soleiðis, at í mesta lagi helvtin av stuðlinum kann brúkast til annað enn til lønir. Fyri 2010 lúka allir flokkar hesa áseting.

Vit endurgeva § 4 í reglugerðini um "stuðul til parlametariskt arbeiði" frá 19. november 2008 niðanfyri:

> *"§4 Í minsta lagi helvtin av stuðlinum eftir § 1 skal nýtast til skrivara/r."*

Samsvarandi §6 stk. f. í reglugerðini um stuðul til flokkarnar á tingi og um løn til floksskrivarar skulu flokkarnir føra eitt ognaryvirlit yvir ognirnar hjá flokkinum.

**Setanarskriv hjá Tinglimum**
Lóggávan ásetur, at løgtingsmaður, sum er í almennum starvi í mesta lagi kann starvast 50% av tíðini í hesum starvi, meðan hann er løgtingsmaður ella varamaður fyri løgtingsmann. Vit hava kannað, um skjalprógv fyriliggur frá arbeiðsgevarum, ið koma undir hesa reglu, sum kom í gildi pr. 1. august 1999.

Spurningurin er, um reglurnar sum heild eru nøktandi. Lógarkravið viðv. starvsumráði v.m. er greitt, men tað vanta greiðir sanktiónsmøguleikar, tá tingmaður ikki lýkur treytirnar.

**Roknskapargóðkenning**
Stjórin á Umsiting tingsins, Løgtingsins umboðsmaður og Landsgrannskoðarin góðkenna roknskapin hvønn mánaða. Stjórin á Umsiting tingsins góðkennir síðani tann samlaða roknskapin.

**Grannskoðanarfrágreiðing 2009**
Vit hava kannað og staðfest, at formansskapurin hevur viðgjørt og góðtikið grannskoðanarfrágreiðingina fyri 2009.

## Upplýsingar viðv. roknskapinum

Roknskapur løgtingsins við tilhoyrandi stovnum er settur upp í Landskassaroknskapinum fyri 2010.

Niðanfyri eru høvuðskontur á §1 settar upp. Yvirlitið vísir nýtslu og játtan fyri 2010. Upphæddirnar fyri 2009 eru somuleiðis vístar (t.kr.).

| | SKJAL | t.kr. 2010 | t.kr. Játtan | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|---|
| **Umsiting tingsins** | | | | |
| Eftirløn og bíðiløn til løgtingsmenn | D | 4.450 | 4.446 | 4.546 |
| Løgtingsarbeiði | | | | |
| Løgtingsmenn | | 18.295 | 19.157 | 18.159 |
| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | | 1.650 | 1.767 | 1.641 |
| Eftirlitsuppgávur | | 0 | 150 | 0 |
| Fyrisiting løgtingsins | | 9.198 | 9.399 | 8.935 |
| Løgtingsarbeiðið tilsamans | A | **29.143** | **30.473** | **28.736** |
| Nýggjur bygningur til Føroya Løgting | E | 0 | 0 | 258 |
| | | **33.594** | **34.919** | **33.540** |
| **Stovnar, knýttir at løgtinginum** | | | | |
| Landsgrannskoðanin | B | 5.941 | 5.962 | 5.147 |
| Løgtingsins umboðsmaður | C | 3.176 | 3.175 | 3.122 |
| | | **9.116** | **9.137** | **8.269** |
| **Kostnaður, løgtingið tilsamans** | | **42.710** | **44.056** | **41.809** |
| Játtan tilsamans | | 44.056 | | 43.793 |
| **Minninýtsla í mun til játtan** | | **1.346** | | **1.984** |

Niðanfyri hava vit gjørt viðmerkingar til útvaldar høvðuskontur í mun til játtanir og í mun til 2009. Viðmerkjast skal, at sambært játtanarskipanina, skulu játtanir haldast á høvuðskontustigi, og somuleiðis skulu lønarjáttanir haldast. Frávik kunnu verða á standardkontum - undirkontur til høvuðskontur - í mun til tær ætlanir, stovnurin upprunaliga hevði.

**Samlaði raksturin**
Samanumtikið vísir roknskapurin fyri 2010, at talan er um eina minninýtslu í mun til játtan á nærum øllum høvuðskontum. Kostnaðurin er samanlagdur 42,7 mió.kr., meðan játtanin er uppá 44,1 mió.kr. Kostnaðirnir eru hækkaðir samanlagt við 901 t.kr., í mun til 2009.

**Løgtingsmenn**
Niðanfyri er høvuðskontan løgtingsmenn nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar, í mun til 2009 og í mun til ætlanina fyri 2010 (t.kr.):

| | 2010 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2009 | Munur 2009-10 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 15.051 | 15.682 | -631 | 14.793 | 259 |
| Keyp av vørum og tænastum | 959 | 1.065 | -106 | 1.001 | -42 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 2.062 | 2.150 | -88 | 2.120 | -58 |
| Tilskot til útlandið | 223 | 260 | -37 | 246 | -23 |
| | **18.295** | **19.157** | **-862** | **18.159** | **135** |

Verður samanborið við játtanina er talan um eina lækking í lønum uppá 631 t.kr. Samanborið við 2009 eru

lønirnar hækkaðar 259 t.kr.. Í sambandi við keyp av vørum og tænastum er talan um eina minninýtslu uppá 106 t.kr., samanborið við játtanina. Samanlagt er nýtslan 862 t.kr. minni enn játtanin. Samanborið við 2009 er talan um eina hækking í samlaða kostnaðinum uppá 135 t.kr.

**Stuðul til parlamentariska arbeiðið**

| | 2010 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2009 | Munur 2009-10 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 1.521 | 1.567 | -46 | 1.544 | -23 |
| Keyp av vørum og tænastum | 39 | 200 | -161 | 63 | -24 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 90 | 0 | 90 | 34 | 56 |
| | **1.650** | **1.767** | **-117** | **1.641** | **9** |

Sum víst omanfyri eru útgoldnar lønir fyri parlamentariskt arbeiði 46 t.kr. lægri samanborið við játtanina fyri 2010. Sammett við 2009 er talan um eina lækking í útgoldnum lønum uppá 23 t.kr. Samlaði stuðulin til parlamentariskt arbeiði er farin úr 1.641 t.kr. í 2009 uppá 1.650 t.kr. í 2010. Ein hækking uppá 9 t.kr.

**Umsiting tingsins**

Niðanfyri er høvuðskontan umsiting tingsins nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2009 og í mun til ætlan fyri 2010 (t.kr.):

| | 2010 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2009 | Munur 2009-10 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 5.401 | 5.858 | -457 | 5.413 | -12 |
| Keyp av vørum og tænastum | 2.960 | 3.191 | -231 | 2.839 | 121 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 787 | 500 | 287 | 627 | 160 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 197 | 0 | 197 | 202 | -4 |
| Ymiskur rakstrarkostnaður | 12 | 0 | 12 | 19 | -7 |
| Søla av vørum og tænastum | -159 | -150 | -9 | -164 | 6 |
| Skattur og avgjøld | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| | **9.198** | **9.399** | **-201** | **8.935** | **262** |

Útgreiningin vísir, at samlaðu kostnaðir eru 201 t.kr. minni enn játtað. Størsta minninýtslan er lønir, sum er 457 t.kr. minni enn játtað, samstundis sum minninýtslan av keyp av vørum og tænastum er 231 t.kr. minni enn játtað. Keyp av útbúnaði, netto eru 160 t.kr. hægri enn í 2009. Samanborið við 2009 er samlaði kostnaðurin til umsting tingsins í 2010 hækkaður við 262 t.kr.
Í skjali A eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Landsgrannskoðanin**

Niðanfyri er høvuðskontan landsgrannskoðanin nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2009 og í mun til ætlan fyri 2010 (t.kr.):

| | 2010 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2009 | Munur 2009-10 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 4.684 | 4.300 | 384 | 3.830 | 855 |
| Keyp av vørum og tænastum | 845 | 1.065 | -220 | 702 | 143 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 2 | 150 | -148 | 49 | -47 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 354 | 345 | 9 | 339 | 15 |
| Ymsar rakstrarútreiðslur | 2 | 2 | 0 | 1 | 1 |
| Innanh. flytingar | 0 | 0 | 0 | 170 | -170 |
| Løgtingsgrannskoðararnir | 53 | 100 | -47 | 57 | -4 |
| | **5.941** | **5.962** | **-21** | **5.147** | **794** |

Sambært útgreiningini viðv. landsgrannskoðanini er talan um hækkingar á lønarøkinum uppá 855 t.kr., í mun til 2009. Í mun til lønarkarmin er talan um eina meirnýtslu uppá 384 t.kr. á lønarøkinum. Avsettar eru 600 t.kr. í sambandi við ógreinað eftirlønarviðurskifti fyri eldri ár. Kostnaðurin til keyp av vørum og tænastum er hækkaður við 143 t.kr., í mun til 2009 – og frávikið í mun til ætlan er ein minninýtsla uppá 220 t.kr. Sammett við játtanina í 2010 hevur stovnurin samanlagt eina minninýtslu uppá 21 t.kr. Í mun til 2009 er samlaði kostnaðurin til landsgrannskoðanina í 2010 hækkaður við 794 t.kr.

Í skjali B eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Løgtingsins umboðsmaður**
Niðanfyri er høvuðskontan Løgtingsins umboðsmaður nærri útgreinað til tess at lýsa kostnaðirnar í mun til 2009 og í mun til ætlan fyri 2010 (t.kr.):

| | 2010 | Ætlan | Frávik Ætlan | 2009 | Munur 2009-10 |
|---|---|---|---|---|---|
| Lønir v.m. | 2.345 | 2.325 | 20 | 2.278 | 67 |
| Keyp av vørum og tænastum | 660 | 600 | 60 | 533 | 127 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 1 | 75 | -74 | 151 | -150 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 170 | 175 | -5 | 160 | 10 |
| | **3.176** | **3.175** | **1** | **3.122** | **54** |

Samanborið við ætlanina fyri 2010 er talan um eina samlaða meirnýtslu uppá 1 t.kr. Størsta meirnýtslan er innan keyp av vørum og tænastum - meirnýtslan er uppá 60 t.kr. Samanborið við 2009 eru kostnaðirnir hækkaðir við 54 t.kr.

Í skjali C eru omanfyri standandi kostnaðir nærri útgreinaðir.

**Grannskoðaraváttan**
Vit skulu vátta, at vit lúka lógarinnar habilitetstreytir, og at vit undir grannskoðanini hava fingið allar tær upplýsingar, vit hava biðið um.

Tórshavn, tann 23. november 2011

**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
løggilt grannskoðaravirki

Jógvan Joensen
løggildur grannskoðari

**Undirritaðu vátta hervið at hava lisið grannskoðanarfrágreiðingina, tann ___ / ___ - 2011.**

| _______________ | _______________ | _______________ | _______________ |
|---|---|---|---|
| Jógvan á Lakjuni | Alfred Olsen | Gerhard Lognberg | Páll á Reynatúgvu |
| formaður | 1. næstform. | 2. næstform. | 3. næstform. |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI

| Løgtingsmenn | t.kr. 2010 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 14.265 | | 14.063 |
| Tímalønt | 0 | | 8 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 283 | | 240 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 504 | | 482 |
| **Lønir v.m.** | **15.051** | **15.682** | **14.793** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 0 | | 3 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 786 | | 636 |
| Umboðan | 123 | | 270 |
| Telefon | 13 | | 0 |
| Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur | 29 | | 58 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 8 | | 33 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **959** | **1.065** | **1.001** |
| Útreiðslugreiddar veitingar | 2.062 | | 2.120 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **2.062** | **2.150** | **2.120** |
| Altjóða felagsskapir | 223 | | 246 |
| **Tilskot til útlandið** | **223** | **260** | **246** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsmenn tilsamans** | **18.295** | **19.157** | **18.159** |

| Stuðul til parlamentariska arbeiðið | t.kr. 2010 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 1.163 | | 1.241 |
| Tænastumenn | 107 | | 97 |
| Tímalønt | 94 | | 54 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 6 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 47 | | 47 |
| Eftirlønir | 103 | | 105 |
| **Lønir v.m.** | **1.521** | **1.567** | **1.544** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 8 | | 20 |
| Keyp av vørum annars | 45 | | 39 |
| Telefon | 64 | | 77 |
| Grannskoðanar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 0 | | 4 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 4 | | 3 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | -82 | | -80 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **39** | **200** | **63** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 82 | | 29 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 8 | | 4 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **90** | **0** | **34** |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Stuðul til parlamentariska arbeiðið - tilsamans** | **1.650** | **1.767** | **1.641** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| **Eftirlitsuppgávur** | **t.kr. 2010** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2009** |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **150** | **0** |
| **Søla av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Eftirlitsuppgávur - tilsamans** | **0** | **150** | **0** |

## SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald

| **Fyrisiting Umsiting tingsins** | **t.kr. 2010** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2009** |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 3.963 | | 3.893 |
| Tænastumenn | 699 | | 684 |
| Tímalønt | 26 | | 234 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 1 | | 26 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 163 | | 164 |
| Eftirlønir | 548 | | 520 |
| Endurgjald í sambandi við lønir | 0 | | -107 |
| **Lønir v.m.** | **5.401** | **5.858** | **5.413** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 0 | | 1 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 64 | | 3 |
| Umboðan | 21 | | 17 |
| Orkukeyp - el | 151 | | 222 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 228 | | 172 |
| Orkukeyp, maskinur, flutningsútbúnaður o.a., olja, oljuúrdrát | 166 | | 181 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 18 | | 14 |
| Keyp av vørum annars | 79 | | 113 |
| Telefon | 53 | | 48 |
| Postgjøld | 6 | | 8 |
| Grannskoðar-, roknskapa- og løgfrøðiligar tænastur | 69 | | 116 |
| Trygging | 37 | | 42 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 1.326 | | 1.160 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 743 | | 741 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **2.960** | **3.191** | **2.839** |

**SKJAL A: LØGTINGSARBEIÐI - framhald**

| Fyrisiting Umsiting tingsins | t.kr. 2010 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| Telduútbúnaður og edv-menning | 734 | | 533 |
| Skrivstovuútbúnaður | 5 | | 0 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 48 | | 94 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **787** | **500** | **627** |
| Húsaleiga | 1 | | 1 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 197 | | 201 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **197** | **0** | **202** |
| **Avskrivingar o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 12 | | 19 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **12** | **0** | **19** |
| Vørusøla til privat | -156 | | -164 |
| Vørusøla til almennar stovnar, virksemi og verkætlanir | -3 | | 0 |
| **Søla av vørum og tænastum** | **-159** | **-150** | **-164** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Fyrisiting Umsiting tingsins tilsamans** | **9.198** | **9.399** | **8.935** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LØGTINGSARBEIÐI TILSAMANS** | **29.143** | **30.473** | **28.736** |

## SKJAL B: LANDSGRANNSKOÐANIN

| Vanligt virksemi | t.kr. 2010 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| Mánaðarlønt | 2.331 | | 2.084 |
| Tænastumenn | 1.179 | | 1.137 |
| Tímalønt | 95 | | 183 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 2 | | 0 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 125 | | 116 |
| Eftirlønir | 952 | | 310 |
| **Lønir v.m.** | **4.684** | **4.300** | **3.830** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 8 | | 28 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 170 | | 103 |
| Umboðan | 42 | | 66 |
| Orkukeyp - el | 13 | | 11 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 25 | | 24 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 7 | | 8 |
| Keyp av vørum annars | 77 | | 69 |
| Telefon | 20 | | 20 |
| Postgjøld | 6 | | 5 |
| Trygging | 3 | | 2 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv- og kunningartøkni | 277 | | 171 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 197 | | 194 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **845** | **1.065** | **702** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 2 | | 8 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 | | 41 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **2** | **150** | **49** |
| Húsaleiga | 328 | | 328 |
| Langtíðarleiga og leiga annars | 4 | | 4 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldskostnaður, bygningar | 22 | | 7 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur** | **354** | **345** | **339** |
| Kostnaðargreiddar veitingar | 2 | | 1 |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **2** | **2** | **1** |
| **Rentukostnaður o.a.** | **0** | **0** | **0** |
| Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr. | 0 | | 170 |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **170** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - innt.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps- mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **Vanligt virksemi tilsamans** | **5.888** | **5.862** | **5.090** |

| SKJAL B: | LANDSGRANNSKOÐANIN - framhald | | |
|---|---|---|---|

| **Løgtingsgrannskoðararnir** | **t.kr. 2010** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2009** |
|---|---|---|---|
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 50 | | 54 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 2 | | 2 |
| | **51** | **100** | **56** |
| Umboðan | 1 | | 0 |
| Keyp av vørum annars | 0 | | 1 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **1** | **0** | **1** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - útr.** | **0** | **0** | **0** |
| **Løgtingsgrannskoðararnir tilsamans** | **53** | **100** | **57** |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **LANDSGRANNSKOÐANIN TILSAMANS** | **5.941** | **5.962** | **5.147** |

| **SKJAL C:** | **LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR** | | |
|---|---|---|---|
| **Vanligt virksemi** | **t.kr. 2010** | **t.kr. Ætlan** | **t.kr. 2009** |
| Mánaðarlønt | 1.334 | | 1.240 |
| Tænastumenn | 697 | | 684 |
| Tímalønt | 41 | | 40 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 20 | | 70 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 72 | | 66 |
| Eftirlønir | 182 | | 179 |
| **Lønir v.m.** | **2.345.224** | **2.325** | **2.278** |
| Ferðing og flutningur, alment sett - innanlands | 38 | | 9 |
| Ferðing og flutningur, alment sett - uttanlands | 80 | | 84 |
| Umboðan | 24 | | 11 |
| Orkukeyp - el | 6 | | 6 |
| Orkukeyp til hiting - olja, oljuúrdráttir og orka annars | 13 | | 12 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 30 | | 7 |
| Keyp av vørum annars | 28 | | 58 |
| Telefon | 20 | | 23 |
| Postgjøld | 11 | | 7 |
| Trygging | 2 | | 1 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 221 | | 141 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 187 | | 175 |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **660** | **600** | **533** |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 1 | | 51 |
| Innbúgv, maskinur og útbúnaður annars | 0 | | 100 |
| **Keyp av útbúnaði, netto** | **1** | **75** | **151** |
| Húsaleiga | 164 | | 164 |
| Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar | 6 | | 0 |
| **Leiga, viðlíkahald og skattur o.a.** | **170** | **175** | **160** |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR TILSAMANS** | **3.175.782** | **3.175.000** | **3.122** |

## SKJAL D: EFTIRLØN OG BÍÐILØN TIL LØGTINGSMENN

| Kostnaður | t.kr. 2010 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| Tænastumannaeftirlønir | 4.439 | | 4.546 |
| Tilskot til einstaklingar undir sosialum skipanum | 11 | | 0 |
| **Tilskot til einstaklingar** | **4.450** | **4.446** | **4.546** |
| **Innanh. flyt. millum almennar stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **EFTIRLØN OG BIÐILØN TIL LØGTINGSMENN TILSAMANS** | **4.450** | **4.446** | **4.546** |

## SKJAL E: NÝGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS

| Kostnaður | t.kr. 2010 | t.kr. Ætlan | t.kr. 2009 |
|---|---|---|---|
| **Lønir v.m.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyp av vørum og tænastum** | **0** | **0** | **0** |
| **Leiga. Viðlíkahald og skattur** | **0** | **0** | **0** |
| **Ymiskur rakstrarkostnaður** | **0** | **0** | **0** |
| Bygningar, privat | 0 | | 258 |
| **Bygging og løguframleiðsla** | **0** | **0** | **258** |
| **Skattur og avgjøld** | **0** | **0** | **0** |
| **Innanh. flyt. millum stovn. - kostn.** | **0** | **0** | **0** |
| **Keyps-mvg** | **0** | **0** | **0** |
| **NYGGJUR BYGNINGUR TIL FØROYA LØGTINGS** | **0** | **0** | **258** |